## Væl løntur rithøvundur

Hvítu Húsini hava nú almannakunngjørt sjálvuppgávuna hjá Barrack og Michelle Obama fyri 2008, og talan er um stór tøl, skrivar Washington Post. Sjálvuppgávan vísir, at meginparturin av inntøkunio hjá hjúnunum stavaði frá bókunum «The Audacity of Hope» og «Dreams From My Father». Sambært Washington Post fingu tey umleið 15 milliónir krónur burtur úr bókasølu í fjør. Aðrar inntøkur góvu umleið eina millión krónur. Obama forvann væl meiri burtur úr bókasølu í 2007. Tað árið seldi hann bøkur fyri næstan 25 milliónir krónur. Washington Post skrivar, at Obama-hjúnini rindaðu 5 milliónir krónur í skatti í fjør. Herumframt góvu tey ymsum vælgerðarfelagsskapum eina millión krónur.



## 40 procent er hjáveiði

Uppgerðir hjá Heimsnáttúrugrunninum WWF vísa, at umleið 40 prosent av tí fiski, sum verður veiddur í høvunum kring heimin, er hjáveiði. Grunnurin sigur hetta vera sera óheppið, tí at kalla øll hjáveiðan verður tveitt aftur í havið. WWF sigur, at heimsins fiskiveiðilond mugu leggja seg eftir at skipa veiðina so, at tað slepst undan hjáveiði í mest møguligan mun. Tað, sum nú fer fram, er einki minni enn ein umhvørvislig, búskaparlig og menniskjalig vanlukka. Sambært grunninum verða 95 milliónir tons af fiski veidd árliga, og av hesum eru 39 milliónir tons hjáveiði.

# Ritan hóskandi avloysari fyri Másan

**Strandfaraskip Landsins hevur um páskirnar roynt Rituna, sum hevur røkt svínoyarleiðina. Skipið hevur riggað avbera væl, men enn er ov tíðliga at siga, um svínoyarleiðin fær eitt nýtt skip fyri 50 ára gamla Másan, sum arbeitt verður við at skifta út**



*50 ára gamli Másin skal skiftast út. Spurningurin er bert hvussu. Ritan, sum hevur røkt svínoyarleiðina um páskirnar, vísir seg at vera ein góður avloysari fyri Másan*

*Savnsmynd*

SAMFERÐSLA

*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Um páskirnar hevur Ritan, ið vanliga røkir nólsoyarleiðina, verið í sigling á svínoyarleiðini. Sum skilst, hevur nógv fólk ferðast í oyggjarnar hesar dagarnar, og er fólkið væl nøgt við Rituna.

- Tað hevur gingið óalmindiliga væl, sigur Jóhan Petur Abrahamsen, skipsinspektørur hjá Strandfaraskip Landsins.

- Ritan gevst í dag. Hetta var ein roynd fyri at síggja hvat skipið kann nýtast til. Vit hava eina lítla játtan á fíggjarlógini, sum ikki røkkir til nýtt skip á svínoyarleiðini. Tískil royna vit at finna eina loysn við teimum skipum, vit hava í sigling, greiðir Jóhan Petur Abrahamsen frá.

Másin, sum í ár hevur fimti ár á baki, hevur ligið á beding hesar dagarnar, og fer aftur á beding seinast í mánaðinum, tá nýggjur rottangi skal setast í skipið. Í løtuni er Strandfaraskip Landsins í ferð við eftirmetingarnar av siglingini hjá Rituni á svínoyarleiðini. Tað er eingin loyna, at Másin ikki er rætta skipið til siglingina á svínoyarleiðini, men støða skal eisini takast til, um Ritan er eitt hóskandi skip.

- Tølini vísa, at 74 fólk vóru við ein túr, og 79 ein annan. Men dagliga ferðast kanska sjey fólk við Másanum. Tá kann tað ikki loysa seg at seta eitt skip í sigling, sum tekur 100 fólk.

Jóhan Petur Abrahamsen leggur afturat, at onkrar tillagingar skulu gerast, um eitt skip sum Ritan verður sett í sigling. Havnaviðurskiftini mugu til dømis broytast, umframt aðrar tillagingar við skipinum.

- Men afturmeldingarnar vóru óalmindiliga góðar frá ferðafólki, ið gjørdi brúk av Rituni um páskirnar. Og tað er sera umráðandi fyri okkum at vita, sigur hann.

### Másin á pensjón

Meðan Ritan hevur siglt á svínoyarleiðini, hevur Sam røkt nólsoyarleiðina, og Ternan leiðina millum Klaksvík og Kalsoynna. Ternan er eykaskip hjá Strandfaraskip Landsins, men hóskar ikki til sigling út til Svínoyar og Fugloyar. Nú fer Strandfaraskip Landsins at gera eftirmetingar, og tilmæli til landsstýrismannin, sum tekur avgerð um hvat skal gerast.

- Vit hava nú roynt bæði við Rituni og einum lokalum báti, sum møguliga kunnu avloysa Másan, og báðir hava víst seg at rigga sera væl. Vit arbeiða í móti at skifta Másan út. Spurningurin er bara hvussu. Til tað gera vit eitt tilmæli, sum verður sent landsstýrismanninum, sigur Conrad Gaard Joensen, rakstrarleiðari hjá Strandfaraskip Landsins.

Landsstýrismaðurin í vinnumálum, Jóhan Dahl, var ikki at hitta á telefonini í dag.

# Norðlýsið summarklárt

**Skonnartin Norðlýsið ger klárt at taka móti ferðafólki í summar. Í summar verður møguleiki hjá ferðafólki at vitja Norðlýsið, ið fer at liggja í Vágsbotni, og nýggir túrar eru settir á summarferðaætlanina**

MENTAN

*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Norðlýsið spílar seg út, nú summartíðin fer at nærkast. Hon hevur um dagarnar býtt um pláss við skonnartina, Torshavn, og er komin yvir í Vágsbotn at liggja.

Summartíðin er enn ikki rættiliga byrjað. Men um vikuskiftið verður Norðlýsið saman við hinum skipunum hjá fyritøkuni, vertur fyri 150 starvsfólk á danskari fyritøku, ið ynskja at koma inn undir húðina á Føroyum, sum ferðamannaland.

- Hetta er triðja árið á rað, at vit eru í hesum samstarvi. 15 instruktørar eru við í ferðalagnum, og fara tey um vikuskiftið út við okkara bátum, sigur Steinbjørn í Dali, formaður í felagnum fyri Norðlýsið.

Summartíðin hjá Norðlýsinum byrjar annars 1. mai. Frá tí degi fer Norðlýsið at liggja í Vágsbotni saman við Westward Ho, og møguligt verður hjá fólki at koma umborð at síggja skipið. Harafturat fer Norðlýsið at skipa fyri nýggjum túrum í summar. Einum spildurnýggjum túri fyri fyritøkur.

- Vit hava bygt ferðaskránna út í summar, so nógv fokus verður á Nólsoynna í summar. Umframt vanligu túrarnar, fara vit at hava ein túr fyri fyritøkur, sum vit sigla út á Boruna, har Tornið við heimsins enda er at finna, og at síggja gomlu bygningarnar har, sigur Steinbjørn í Dali.

Summarsiglingin hjá Norðlýsinum fevnir um útferðir til Nólsoyar, rundferðir, har siglt verður fram við fuglabjørgunum, grottokonsertferðir og fiskitúrar.



*Í summar fer Norðlýsið at liggja í Vágsbotni, har møguleiki verður hjá ferðafólki at koma umborð at síggja skipið. Eisini er ferðaætlanin útbygd soleiðis, at meir fokus verður á Nólsoynna í summar.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*